# Fyribilsfrásøgn um garnasótt hjá seyði í Føroyum

*Eftir*

*Dánjal J. Bærentsen.**)

Garnasótt (paratuberculosis ella Johne's disease) er ein ólekjandi smittusjúka hjá jóturdýrum, neyti, seyði og geit.

Onnur jóturdýr eitt nú dádýr, búflar[1] og reindýr[2] kunnu eisini fáa sjúkuna.

Eyðkent fyri sjúkuna er ein varandi bruni í gørnunum, fyrst í vilunum, men seinni í øllum gørnunum. Garnaveggurin trútnar og somuleiðis slímhinnan, sum verður rukkut. Dýrið fær afturvendandi innrið ella skitju, sum kann vara í mánaðar, til tað at enda doyr í raki.[1 2 3]

Sjúkan er vælkend í grannalondum okkara eitt nú í Skotlandi[4 5], Írlandi[6], Noregi[7], Danmark[8]. Til Íslands kom hon við innfluttum seyði í 1933[1].

Garnasótt er ikki áður staðfest í Føroyum.

Á vári 1974 nevndi vágamaður fyri landsdjóralæknanum, at einstakir seyðir í góðum árum doyðu í raki í Giljum og á Eggini. Tað er ikki óvanligt, at seyður doyr í raki um hesa árstíð í Føroyum, so einki varð gjørt burtur úr hesum tá, men seinast í november varð aftur boðað frá ungum seyði, sum holdini runnu av, og so varð farið vestur at hyggja at.

Tað var ein 3-vetur ær av Eggini í Miðvági. Ærin hevði

---

*) From the Chief Veterinary Officer, Faroe Islands.

átt miðalgott gimburlamb, sum var slept upp. Ærin hevði fleiri ferðir verið viðgjørd bæði fyri iglar, lungna- og garnaormar, tí hon skitjaði, men holdini runnu kortini av henni, til hon at enda ikki orkaði at standa.

Ærin varð dripin og skorin upp. Skitjut og kaldarak. Veggirnir í vilunum, langanum og skarngørnini tjúkkir, og somuleiðis var slímhinnan í hesum gørnum tjúkk og rukkut serliga í langanum. Eitlarnir í garnmørsoyranum sum heild vanligir, tó trútnir í støðum.

Garnalutir og eitlar av ærini vórðu hin 9/12-1974 sendir til *Statens veterinære Serumlaboratorium*, Keypmannahavn, og biðið varð um kanning fyri paratuberculosis. Hin 12/12 skrivar J. Berg Jørgensen, at við sjóneyku varð funnið ótal av paratuberklabakterium í eitlum og slímhinnu, og í skrivi frá 23/4-1975 sigur hann frá, at við aling er funnið fram til, at talan er um tað gullitta slagið av paratuberklabakterium.

Síðan tað í desember 1974 varð almannakunnugt, at garnasótt var funnin í Vágum, hava fleiri menn ymsastaðni í Føroyum vent sær til landsdjóralæknan at siga frá líknandi tilburðum, og tilfar frá 9 seyðum hevur síðan verið sent til Serumlaboratoriet til kanningar. 3 av hesum seyðum høvdu garnasótt, men enn kann einki sigast um slagið, tí úrslitið av bakteriualingini, ið tekur um 4 mánaðir, er ikki komið enn.

Teir 3 nýggju tilburðarnir vóru ein 3-vetur ær úr Sandfellishaga í Streymnesi, ein 4—5 vetur ær úr Skarðhaga á Hellunum og ein 5-vetur ær av Heimara Leiti í Miðvági.

Ætlanin er í heyst at fara undir at kanna, hvussu víða um oyggjarnar garnasóttin er, og fáa hana kortlagda, og hvussu hon tekur seg upp undir okkara umstøðum í húsdýrahaldi, sum eru rættiliga ólíkar umstøðunum í øðrum londum, sjálvt í grannalondum okkara.

Kanningin fer fram á tann hátt, at biðið verður um aftasta enda av vilunum á øllum dripnum seyði, sum er vetur gamal ella eldri. Vilini verða her kannað við sjóneyku, og verða paratuberklabakteriur funnar, verður kannað nágreiniligari við aling á *Statens veterinære Serumlaboratorium*, Keypmanna-

havn, fyri at avgera slagið. Samstundis verður við høvi tikið blóð av vaksnum neytum til kanningar við komplementroynd á Statens veterinære Serumlaboratorium.

## BÓKMENTIR


1. *Gíslason, G.:* »Um garnaveiki í saufé«. Reykjavík 1939.
2. *Sigurðarson, S.:* »Það er hægt að útrýma garnaveiki«. 1975.
3. The Merck Veterinary Manuel. Third Edition. New York 1967.
4. *Wilson Taylor, A.:* Ovine Paratuberculosis (Johne's Disease of Sheep. The Journal of Comparative Pathology and Therapeutics, Vol. LV No. 1. January, 1945.
5. *Stamp, J. Dr.:* »Johne's Disease of Sheep as seen in Scotland«, Animal Disease Research Assosiation, Moredon Institute, Scotland. Ikki dagfest.
6. *O'Brien, J. J., A. Baskerville & T. H. Mc Clelland:* »Johne's Disease in Sheep in Northern Ireland«. Br. vet. J. *128:* 353. 1972).
7. Norsk Veterinærstatistik. Oslo 1973.
8. Årsberetning fra Veterinærdirektoratet. København 1974.


## SUMMARY


Paratuberculosis has never been recorded before in Faroe Islands.

One sheep with symptoms of paratuberculosis was killed and the diagnosis was confirmed by microscopy and cultivation at the State Veterinary Serum Laboratory, Copenhagen.

The disease was caused by an orange-pigmented strain of Mycobacterium paratuberculosis.

Research will be carried out to find how widespread the disease is and how the morbidity is under the speciel circumstances in Faroe Islands.